# Ætla at gera skjótt av

**Málið um at gera nýggja ferjulegu í Trongisvági og tunnil ímillum Øravík og Hov, kemur framaftur longu í dag**




*Nú verður tað fyrsta dagin, at endalig støða verður tikin til samferðsluhavnina í Trongisvági og tunnilin ímillum Øravík og Hov*

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Enn er óvist, hvussu verður við ætlanunum at gera nýggja samferðsluhavn í Trongisvági og tunnil ímillum Øravík og Hov.

Men tað skilst á øllum brøgdum, at tað verður ein av allarfyrstu døgunum, at endalig avgerð verður tikin. Á tingfundi týsdagin fekk vinnunevndin hjá løgtinginum uppskotið um at gera samferðsluhavn, aftur í høvdið. Men Henrik Old, formaður í vinnunevndini, sigur, at nevndin fer at gera skjótt av.

– Vit fara at leggja málið fyri fyri tingið longu aftur í dag, sigur hann.

Løgtingið hevur samtykt, at bæði arbeiði at gera samferðsluhavn í Trongisvági og arbeiðið at gera tunnil ímillum Øravík og Hov, skulu byrja í ár.

Í tí sambandi mælti ein stórur meiriluti í vinnunevndini til at tengja bæði arbeiðini saman í eina verkætlan, tí tað fer at gera, at landskassin sparir einar 45 milliónir krónur.

Tí hevur meirilutin í vinnunevndini skotið upp at tingið samtykkir, at grótið til samferðsluhavnina verður tikið úr tunlinum ímillum Øravík og Hov.

Tá ið uppskotið var til aðru viðgerð í tinginum, varð hetta eisini samtykt við stórum meiriluta.

Men fyri at verða endaliga samtykt, skuldi tað samtykkjast einaferð afturat. Týsdagin kom tað til triðju viðgerð, men tað endaði við, at nevndin fekk uppskotið aftur.

Tingmenn vístu á, at sumt av grótinum, sum skal brúkast til smferðsluhavnina, er so stórt, at tað ber ikki til at fáa tað úr einum tunli. Tí mæltu teir til, at vinnunevndin gjørdi eina meiri nágreiniliga orðing, sum gjørdi, at tað skuldi bera til at taka nakað av gróti aðrastaðni frá.

Tí varð málið beint aftur í vinnunevndina.

### Gera skjótt av

Men málið fer ikki at liggja longi í vinnunevndini.

Henrik Old sigur, at málið verður tikið til viðgerðar longu í morgun og tað verður lagt fyri tingið aftur seinnapartin í dag.

Men hann sigur, at hann kann ikki hugsa sær, at nakrar stórvegis broytingar fara at verða gjørdar.

– Eg kann ikki hugsa mær, at meirilutin í vinnunevndini fer at víkja frá meginregluni í málinum og hon er, at bæði arbeiðini skulu tengjast saman.

Hann sigur, at allar ábendingar, hann hevur fingið eftir viðgerðina í tinginum týsdagin bendir tvørturímóti á, at tinglimir standa fast við, at tað er óforsvarligt ikki at tengja bæði arbeiðini saman tá ið tað førir eina sparing uppá 45 milliónir við sær.

– Men tað er møguligt, at uppskotið um at grótið verður tikið úr einum tunli ímillum Øravík og Hov kann orðast eitt sindur nágreiniligari.

Henrik Old sigur, at orðingin í uppskotinum skal í hvussu so er ikki vera nøkur forðing at fáa málið loyst.

Tí fer vinnunevndin helst at orða uppskotið soleiðis, at tað skal bera til at taka grót aðrastaðni, sum tað ikki ber til at fáa úr tunlinum.

Hann sigur, at so vítt, hann hevur skilt, snýr tað seg í mesta lagi um eini 10% og tað sindri skal ikki forða fyri, at málið verður loyst.

### Vilja hava svar

Tá ið tingið viðgjørdi málið týsdagin, førdi landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, fram, at verða bæði arbeiðini tengd saman, verður tað ikki fyrrenn í heyst, at farast kann undir arbeiðini.

Hetta vil formaðurin í vinnunevndini hava landsstýrismannin at nágreina.

– Eg vil hava at vita, hví tað ikki ber til at fyrireika arbeiðið beinanvegin, so at Landsverkfrøðingurin ikki beinanvegin sleppur at gera vegin oman til ferjuleguna og byrjar at sprongja og yvirhøvur ger tær fyrireikingar, sum eru neyðugar.

Og er tað neyðugt at gera fleiri boringar fyri at kanna um tað ber til at gera tunnil, har NCC hevur mett seg kunna gera hann fyri 92 milliónir, so vil Henrik Old hava at vita, hví hesar kanningar ikki eru gjørdar, tí hann sigur, at fólk hava leingi verið til reiðar at gera hesar kanningarnar, men onki er gjørt.

Formaðurin dugur heldur ikki at síggja, at fíggingin skal vera nakar trupulleiki, soleiðis sum summi føra fram.

– Løgtingið hevur samtykt at fara undir bæði tunnilin og samferðsluhavnina í ár. Hvussu tað so kann verða ein trupulleiki við fíggingini, at tengja bæði arbeiðini saman, tá ið tað førir eina sparing við sær upp á einar 45 milliónir, skilji eg ikki.

Henrik Old vísir eisini á, at 25 milliónir eru settar av til samferðsluhavn í ár og sjey milliónir til tunnil, so tað skuldi ligið væl fyri at byrja.

– Men tað ber eisini til at fíggja arbeiðið yvir fleiri ár, hóast tey verða gjørd beinanvegin, sigur hann. Hann vísir á at tað er gjørt í Vágatunlinum, tí hann skal landið betala til í nøkur ár afturat og tað verður eisini gjørt í Norðoyatunlinum, tí landið skal betala til hann í fleiri ár eftir, at hann er liðugur.

– Tað ber eisini til hjá landinum at sprongja útbygginginarkvotuna í ár og næsta ár og so at toga innaftur í 2005, tí samanlagt førir tað eina sparing við sær uppá 45 milliónir og tað átti at verið góður politikkur, sigur Henrik Old.

## Bilar og klæðir í ítróttarhøllini í Trongisvági

**Hetta vikuskiftið verður framsýning í ítróttarhøllini í Trongisvági**

FRAMSÝNING
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Hetta vikuskiftið verður ítróttarhøllin í Trongisvági karmurin um eina framsýning av bilum, klæðum og ymsum evnum til reingerð.

Tað er gamlaársnevndin á Tvøroyri, sum skipar fyri og framsýningin er opin fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin.

Fríggjadagin er opið frá kl. 18-22, men bæði leygardagin og sunnudagin er opið frá kl. 14-20.

Framsýningin av bilum er høvuðstátturin á stevnuni og hesuferð eru bilasølurnar fimm í tali: Reyni Service, Berg Motors, Nordbil, Wenzel og Eyðbjørn Hansen.

Men á framsýningini hesuferð verður eisini ein framsýning av klæðum. Toystovan sýnir fram mótaklæðir, Pau hevur klæðir, sum tey sjálvi sniðgeva, Duett hevur ítróttarklæðir og Alval hevur arbeiðsklæðir.

Í hesum sambandi verða mótasýningarleygardagin kl. 17 og sunnudagin kl. 16.



*Hetta vikuskiftið verður framsýning í ítróttarhøllini í Trongisvági*

Men umframt alt hetta, er eisini ein framsýning av ymsum evn-um til reingerð.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Elsa Margretha Frederiksen 90 ár

Í gjár, mikudagin 23. apríl, fylti Elsa Margretha Frederiksen í Miðvági 90 ár. Elsa Margretha er fødd og uppvaksin í Miðvági. Hon er dóttir Alith og Joen Paula Ellefsen, í Miðvági. Hon giftist við Edvard Frederiksen úr Miðvági, og fingu tey fimm børn, tey eru: Joen Pauli, John, Anni, Árni og Regin. Edvard doyði í 1984. Hóast høga aldurin livir Elsa Margretha væl, hon eigur 21 ommubørn og 26 langommubørn.



### Dagurin

24. apríl. Albertus, deyður í umleið 997. Biskupur í Prag. Týska navnið merkir *ediligur* ella *lýsandi*.

### Vinjard Falkvard Joensen

**23. oktober 1945 - 20. apríl 2003**



Páskamorgun, 20. apríl, andaðist Vinjard Falkvard Joensen í Sørvági, 57 ára gamal. Vinjard var føddur í 1945 í Sørvági, har hann eisini vaks upp. Hann var sonur Aslaug Falkvard og Louis Joensen í Sørvági. 17 ár gamal flutti hann til Havnar, har hann lærdi á skrivstovuni á Saltsøluni. Um summarið í 1966 og 67 róði hann út í Grønlandi, og veturin 66-67 var hann læraravikarur í Mikineshólmi. Í 1967 giftist hann við Marjun, dóttir Ingibjørg og Napoleon Johannesen í Havn. Í 1970 keypti hann trolbátin Barið. Hann fekk skiparaprógv fyrst í 70-unum. Frá 1980 sigldi hann við trolbátinum út frá Bornholm. Frá 1989-94 leigaði hann bóndagarðin hjá Óla Jákup Müller í Havnardali. Vinjard var t.d. við til at stovna Føroyskt/Íslenskt Rossafelag og Seyðahundafelagið. Miðskeiðis í 90-unum gjørdist hann sjúkur og fekk eina stóra skurðviðgerð. Hann kom tó væl fyri seg aftur og í 1998 flutti hann til Sørvágs og stovnar har sína egnu fyritøku, eina landingarmiðstøð. Hann keypti eisini eitt ísvirki í Sørvági. Nýliga keypti hann eina stóra goymsluhøll í Sørvági, sum hann skuldi brúka til landingarmiðstøð. Mikines var hansara frítíðarparadís, har átti hann hús, og har treivst hann sera væl. Marjun og Vinjard fingu trý børn: Kristu, ið varð fødd í 1968, hon andaðist bert hálvt ára gomul, Ingu í 1969, hon andaðist 20. mars í fjør, 32 ára gomul, og Pola ið er føddur í 1972. Friður veri við minninum um Vinjard Joensen.

## Heimsfrumsýning av filmi við føroyskum dansi

Fríggjakvøldið 25. apríl kl 21.00 verður í Park Bio í Keypmannahavn heimsfrumsýning av 10 norðurlendskum dansifilmum við felagsheitinum "Moving North". Hvør filmur í "pakkanum" er 5 minuttir til longdar.

Ein av hesum 10 filmum er "Regin smiður", sum Katrin Ottarsdóttir hevur leikstjórnað. "Regin smiður" er ikki ein filmur um føroyskan dans, men heldur eitt slag av musikkvideo við Føroyskum dansi. Tað eru fólk úr dansifelagnum Fótatraðk og onnur, ið dansa. Heimsfrumsýningin verður sum nevnt í Keypmannahavn. Ætlanin er at filmarnir skulu hava føroyska frumsýning á Listastevnuni í summar. Nærri upplýsingar um hetta fáast við at venda sær til Oddvá Nattestad.



*Katrin Ottarsdóttir*

### Alma Joensen

**24/11-1927 27/3-2003**

**Sunnba**

umhugsin og heil
góð og gávurík

vinir mínir
vinir tínir

um títt stóra hjarta
og
heitu armar
var sambandið út í heimin

altíð
fyrst at spyrja

altíð
fyrst at hjálpa

altíð
við tí góða
orðinum

og
nú armarnir
ikki
orkaðu meir

vikast
ikki
myndin

í
brimduninum
undir
beinisvørði

**martin næs**
18/4-2003

## Trettan føroyskir bil-lakkerarar á skeið




*Trettan lakkerarar vóru á skeiði á tekniska skúla í Silkeborg. Aftast frá vinstru: Sámal Olsen, Toftir, frá Hjá Fróða í Tórshavn, Niels Nattestad, Miðvágur, frá Carro í Sandavági, Petur Krog Miðvágur, frá Mylluni í Miðvági, Dánjal Jákup Joensen og Karl Sofus í Heimistovu, báðir úr Klaksvík, frá Bilverkstaðnum v/John Heinesen í Klaksvík. Miðraðið frá vinstru: Jan Jacobsen, Tórshavn, frá Bilverkstaðnum v.Hans Jacob Kollsker á Hjalla, Magnus Pauli Udbø, Hoyvík, frá Reyni Service í Hoyvík, Jógvan Pauli Joensen, Miðvágur, frá Mylluni í Miðvági, Eyðun Viðstein, Kollafjørður, frá Bilasøluni v.Øssur Johannesen í Hoyvík. Fremst frá vinstru: Brian Hughes, Klaksvík, frá bilverkstaðnum hjá Elmar Zachariasen í Klaksvík, Eyðstein Jacobsen, Hoyvík, frá Reyni Service í Hoyvík. Á myndini vantar Ólavur Hansen, Klaksvík, frá Bilskrokk í Tórshavn*

Herfyri vóru bil-lakkerarar frá ymiskum føroyskum bilverkstøðum á skeið á tekniska skúlanum í Silkeborg. Danska lakkfyritøkan Baden-Jensen skipaði fyri skeiðinum, teir umboða Spies Hecker, ið er størsti framleiðari av lakki í vesturheiminum. Skeiðið umfataði alt tað nýggjasta innan lakkering, smáumvælingar og poleringsteknikk. Serliga var tað nýggja umhvørvisvinarliga Greentec Line lakkið, ið er vantbaserað og lýkur tey strongu ES-krøvini, ið koma í gildi í 2007. Á Plátu- og lakkeringsverkstaðnum hjá Reyni Service í Hoyvík brúka teir longu nú vatnbaseraða lakkering við umhvørvisvinarliga Greentec Line lakkinum.

Lakkdeildin hjá málingahandlinum Hjá Fróða í Havn umboðar Speis Hecker lakkið í Føroyum.